# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# VALFJÁLTUR Á TINGFÓLKI

Í síðstu viku átti Fólkaflokkurin politiska leikpallin, tá flokkurin tók løgmann av ræði og legði saman umsitingina av Uttanríkisráðnum og Fiskimálaráðnum. Fólkafloksformaðurin, sum hevur staðið í skugganum av gamla fólkafloksformanninum, fær ikki markerað seg í Uttanríkisráðnum:

Bara at senda neyðhjálp til Cambodia og at stuðla onkrum skúla í Liberia, gevur ikki formanninum tað rásarúmið, sum krevst. Tí vóru hyggjuráðini, at Anfinn Kallsberg legði frá sær, og at Jørgen tekur yvir sum skuggafíggjarmálaráðharri í fíggjarnevndini og har fær framt fólkafloksþolitikk í verki, sum hann ikki fær í Uttanríkisráðnum.

Um vikuskiftið síðsta royndi Javnaðarflokkurin at skapa yvirskiftir við at latast sum um, at flokkurin lat seg freista av tilboð frá Tjóðveldinum um, at Eyðgunn Samuelsen skuldi gerast forkvinna í fíggjarnevndini – afturfyri, og sum takk fyri seinast.

Í hesi vikuni eru tað teir smáu, sum royna at seta yvirskriftir. Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vilja ikki vera við til at gera liðugt arbeiðið í Stjórnarskipanarnevndini. Sjálvstýri fer at skriva sítt egna álit, tí hitt førir ikki til nakað, meðan Miðflokkurin heldur Hans Paula Strøm vera so ringan sambandsmann – og so fær flokkurin heldur ikki tað ófødda barnið við í stjórnarskipanararbeiðið.

Tríggir sjálvstøðugir tingmenn, ein úr andstøðuni, ein úr andstøðuni í samgonguni og ein úr samgonguni – hava lagt uppskot fram á ting um at skerja tingmannatalið úr 33 niður í 25. Júst hví 25 er tað magiska talið, hava teir onga góða grundgeving fyri, uttan hana, at »tað verður bíligari at reka samfelagið«, og at tað fer at smitta av gjøgnum alla skipanina.

Jú, mangt skal man hoyra. Men skal tað vera 25, hví so ikki 22, ella 18 ella 15? Jú færri jú bíligari, ikki so?

Hetta má vera politiska skipanin í einum nøtuhylki: Sjónleikur og glantrileikur, sjálvdráttur og sundurlyndi. Hetta bendir á, at politik-



arar heldur vilja gera okkurt annað. Onkur vil látast sum um og vinna øðrum neisur, fleiri vilja fyri alt í verðini seta síni egnu fingramerki, meðan onkur kanska heldur vil halda seg til valdið.

Onkur fjáltur tykist vera á tingfólki, sum hava so stóran tørv á at markera seg – um enn við rættiliga líkagyldugum málum. Og tað hendir, meðan stórmál liggja fyri framman – stórmál, sum skulu reformera – eitt nú fiskivinnan, kommunurnar og skúlaskipanin – fyri ikki at gloyma fíggjarkarmin fyri komandi árið.

Eyðsæð er, at valið nærkast.

**» Eyðsæð er, at løgtingsvalið nærkast í hvørjum...**

## Kann gera ein *jørgen* og ein *anfinn*



Vit hava nakrar tungvektarar í føroyskum politikki. Ein segði upp í síðstu viku. Tað var Anfinn Kallsberg. Ein tungvektara plaga vit at kalla politikara, sum hevur – ella hevur havt stóra ávirkan í politikki. Ein tungvektari kann eisini vera ein politikari, sum hevur sitið so leingi og so væl í politisku skipanini, at hann hevur upparbeitt sær fleiri pensjónir. Ein slíkur er Anfinn Kallsberg.

Men ein annar slíkur er Jóannes Eidesgaard. Og tá hann fyllir 60 ár 19. apríl, so kann hann bæði gera ein *»jørgen«* og ein *»anfinn«*: Hann kann venda politikkinum bakið og fara til hús, tí átta ár í Tinganesi gevur fulla pensjón. Ein tungvektari sum Jóannes Eidesgaard fær politikarapensjón sum 60 ára gamal. Hann fær eisini fólkatingspensjón sum 60 ára gamal. Tí kann Jóannes Eidesgaard eykkaleysur trína inn í pensjónistatilveruna við 40.000 krónum í pensjón sum 60 ára gamal.

Um so er, so er hann tann næsti politikarin í ár, sum fer frá við fullari løgmanspensjón.

So um Javnaðarflokkurin eisini skal spæla løgmanni eitt puss og leggja Fíggjarmálaráðið og Heilsumálaráðið saman, so kann passandi fráboða hetta í dimbuldagavikuni – og tá løgmaður so sjálvur afturfyri leggur Almannamálaráðið og Vinnumálaráðið saman – so er parodiin fullkomin!

## Steinbjørn er nú Okkara stjóri

Bryggjaríið Okkara hevur sett Steinbjørn í Dali í starv sum stjóri. Hann hevur verið við í fyrireikingunum frá byrjan av, meðan Wilhelm Petersen var stjóri.

Felagið sigur, nevndin helt Steinbjørn í Dali vera rætta mannin at taka yvir leiðsluna av felagnum, nú virksemið er komi ígjøgnum bytrjanartilgongdina, og tíðin er komin at skifta fokus til tað praktiska.

Steinbjørn í Dali byrjar í starvinum 1. februar.





**» Tá verður tær størri skaði**

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 20



**» Bárður í Listahøllini**

SÍÐA 24

## Nógvar skoytprinsessur



*Rebekka, Anna og Guðrun, sum ganga í 3. a í Hoyvíkar skúla, royndu breytina í gjár*

Fólk hava tikið væl ímóti nýggjasta tiltakinum hjá Tórshavnar kommunu, sum er skoytibreytin á Skálatrøð.

Tað var týsdagin, at breytin varð tikin í nýtslu, tá 13 ára gamla hálvføroyska skoytuprinsessan í Danmark, Emma Fríða Andersen, alment tók breytina í nýtslu.

Og síðani hevur verið gravgangur eftir at sleppa at skoyta – bæði tá breytin er alment opin seinnapartin og um kvøldið, men eisini í skúlatíð, tá breytin er ætlað skúlum, frítíðarskúlum og eitt nú barnagørðum millum klokkan 9 og 14.

Av býráðnum frættist, at skúlar og stovnar kunnu bíleggja tíð til skoytubreytina á telduposti til hollin@hollin.fo

Skoytibreytin er annars opin fyri almenninginum yrkadagar millum kl 15 og 22, leygardagar millum 9 og 21 og sunnudagar millum 14 og 21.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*